# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

# Áh, kvinnurørsla




»Bitterfissen« er fyrsta bókin hjá svenska høvundanum Maria Sveland

**Áh kvinnurørsla var kanska eitt meir hóskandi heiti á bókini *Bitterfissen*, ið kemur út á donskum í morgin, sjálvan altjóða kvinnudagin**

Maria Sveland, *Bitterfissen*, Modtryk, 2008

Einaferð var altjóða kvinnudagurin ein stríðsdagur. Nú hevur hann meir dám av at vera ein minningardagur – í øllum førum, um tú lesur teir tankar, svenski høvundurin, Maria Sveland gjørdi sær, tá hon fór undir at skriva bókina *Bitterfissen*:

– Í byrjanini var ætlanin, at *Bitterfissen* skuldi vera ein reportagubók um hjúnabandið og kærleiksmytuna. Eg las allar bøkurnar frá 1970'unum, sum funnust at hjúnabandinum, og eg øvundaði frælsa tíðarandanum og undraði meg yvir, hví vit í mínum ætttarliði gifta okkum meir kirkjukonservativt enn nakrantíð. Og yvir, hví brúdleyp eru vorðin ein milliardaíðnaður ...

So eg fór til Danmarkar at hitta mína stóru fyrimynd Susanne Brøgger. Tað var hon sum segði, at »Tveysemið er eitt slag av skipaðum ólivaðum lívi«.

Men nú sat Susanne Brøgger har, nøgd í sínum trygga hjúnabandi, so eg fór nipin heimaftur og helt á at undrast.

## Snýtt og beisk

Úrslitið var bókin *Bitterfissen*, ið er um Saru, sum er 30 ár og longu beisk. Veruliga beisk. So ein kaldan januardag letur hon mann og barn vera eftir og fer til Tenerife. Við sær á ferðini hevur hon bókina *Fear of flying* – kvinnuklassikaran hjá Erica Jong frá 1970'unum

Sara lesur og leingist. Droymir, at hon er Erica Jong ella ein av øllum hinum kvinnunum, sum høvdu tað nógv stuttligari enn hon, tordu at gera uppreistur móti familjuni og uttan fyrilit tveittu seg út í leys forhold og øll rúsevnini.

Sara kennir seg snýtta og beiska, tá hon hugsar um allar kvinnurnar, ið eins og hon, verða drenaðar fyri orku í familjufongslinum. Tað var ikki soleiðis, tað skuldi vera. Hon droymdi jú bara um kærleikan, líka sum øll onnur.

*»Meðan Erica Jong kundi mogga sum henni lysti, ganga í terapi, taka rúsevni á veitslum, vera vinstrasinnað og við í eini stórari, feitari kvinnurørslu, mátti eg vera tannáringur í teimum anti-feministisku og ræðsluslignu 80'unum, har alt var myrkablátt, sjálvt mascaran«*

Men árið er 2005, og við ræðslu ásannar Sara, at hon leingist meir eftir at sova eina heila nátt enn eftir eini heitari nátt saman við einum tilvildarligum manni.

## Umaftur

Bakperman á *Bitterfissen* vil vera við, at bókin torir at seta allar teir truplu spurningarnar um kærleika, javnstøðu og tað at vera foreldur.

Og eg, sum helt, at vit hava sett hasar spurningarnar nakrar ferðir fyrr.

Hinvegin, kanska fingu vit ongantíð nakað veruligt svar. Og kanska er tað júst tí, spurningarnir mugu setast umaftur altjóða kvinnudagin fyri líkasum at geva teimum eina eyka tyngd.

Ella eisini er *Bitterfissen* bara ein nostalgisk endurminning í skaldahami, sum eins væl kundi itið *Áh, kvinnurørsla.*

Bókin kemur út í morgin, men eitt drúgt brot kann lesast á www.modtryk.dk

**ave**

# Feministur fær av grovfíluni

**Ein bók um skøkjuvirksemi eftir svenska feministin Katarina Wennstam hevur fingið ilt í danskar ummælarar**

Katarina Wennstam, *Smuds*, Lindhardt & Ringhof, 2008

Í Svøríki er tað ólóligt at vitja skøkjur. Tað hevur tað verið í næstan 10 ár, men higartil eru bert 234 dómar sagdir í slíkum málum. Tað er svenski rithøvundurin og journalisturin, Katarina Wennstam, ill um, og tað er høvuðspersónurin í hennara nýggju bók *Smuds* eisini. Hon setur sær tí fyri, bæði at avdúka bakmenninar aftanfyri ólevnaðin og at fáa teir, sum vitja skøkjurnar, dømdar.

## Háð av monnum

Sum so, skuldi boðskapurin hjá Wennstrøm verið einfaldur og eyðsýndur. Men also í so einfaldur, sambært donskum ummælarum.

Á Weekendavísini vil Bo Bjørnvig vera við, at sokallaða krimibókin hjá Katarina Wennstam er ein lang háð av monnum og líka nógv á tremur við fordómum um menn, sum menninir einferð høvdu móti kvinnum.

– Hevndin smakkar uttan iva væl, og onkur heldur nokk eisini, at hon er rættvís, men tað verður hvørgin av pørtunum klókari av, heldur garvaði ummælarin.

Heldur ikki Jakob Levinsen á JyllandsPosten er imponeraður av stríðsritinum hjá Wennstam. Hann vísir á, at endamálið við bókini er ikki, sum hon annars gevur fatan av, at leggja upp til nýtt kjak um umstríddu svensku lógina um skøkjuvirksemi.

– Høvuðsendamálið er heldur at sláa fast við sjey-tumma seymi, at eisini fínir menn við stórari makt eru nøkur grað svín, sum keypa skøkjur, tí teirra ómettandi, ólekra kynsliga drívmegi tvingar teir til tað, físir Levinsen.




Eisini á Politiken situr Søren Vinterberg og kennir seg snýttan av sokallaða kjakinum, bókin leggur upp til, tí sambært honum er lítið at kjakast um. Hann minnir á, at onki rættsiktað menniskja heldur tað vera í lagi, at útnytta fátækar kvinnur seksuelt.

Sjálvt um ein bók ikki nýtist at fara til prývtøku í 'fjølbroytni', so kann hon also væl dumpa uppá eina behagiliga eintáttaða menniskjafatan. Og tað ger *Smuds* so dyggiliga sambært Vinterberg.

Heldur ikki millum kvinnuligu ummælararnar er nøkur serlig vælvild at heinta mótvegis Wennstam.

Mette Strømfeldt á Berlingske Tidende vísir á, at fólk flest longu eru óð um skøkjuvirksemi.

– Tí átti tað ikki verið ov nógv at kravt av einum eldhugaðum feministi sum Wennstam, at hon kom við einum boði uppá, hvat vit skulu gera við hesa óðina, heldur Strømfeldt.

**ave**